Ung klaksvíksgenta í Kunoy:

# Her skal eg búgva alt mítt lív



*Randi er 24 ár. Sonurin, Jón er 3. Tey ætla sær at búgva í Kunoy restina av lívinum*

**Randi Josephsen er 24 ára gomul. Síðani hon varð gift í 1998, hevur hon búð í Kunoy. Upprunaliga er hon býargenta úr Klaksvík, men sjálv sigur Randi, at hon stórtrívist í bygdarumhvørvinum í Kunoy**

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*

**Kunoy:** Ovarlaga í bygdini standa eini hvít hús, og her er tað Randi og maðurin, Rógvi, húsast saman við báðum synunum, Jón og Ivan.

At flyta til Kunoyar sum 21 ára gomul er ikki nakað, sum allar klaksvíksgentur høvdu funnið uppá. Og so verri enn so. Tí var tað kanska ikki so undarligt, at Randi var ein av teimum yngstu giftu konunum í Kunoy, tá hon og Rógvi fluttu inn, sama dagin tey vórðu gift, í 1998.

Sjálv fortelur Randi:

– Tá eg var 16 ár fluttu Rógvi og eg saman í kjallaran í húsunum hjá ommu hansara í Klaksvík. Um hetta sama mundið byrjaðu vit at byggja í Kunoy.

Ætlanin var alla tíðina hjá teimum báðum at flyta til Kunoyar, men av tí, at Randi var við barn, tá tey giftust, valdu tey heldur at steðga við at byggja, og keypa eini hús, sum lógu beint við síðuna av grundstykkinum, sum tey upprunaliga høvdu keypt.



*Uttanfyri stendur eitt spælihús, sum maður Randi, Rógvi hevur bygt. Her plaga Jón og beiggin, Ivan (1 ár) at spæla*

### Stórtrívist

Foreldrini hjá Randi vóru eitt sindur bangin um hana í fyrstuni. Tey óttaðust fyri, at hon ikki fór at trívast í einum so bygdarligum umhvørvi, men nú er mamma Randi dagligur gestur í bygdini.

– Mamma elskar at vitja her. Tá tað er summar, so kemur hon her, og er her ein heilan dag. Tá plaga vit at grilla uttanfyri og sóla okkum. Og er nakað paradís á jørð, so er hetta tað, sigur klaksvíksgentan.

Men hví hevur ein býargenta, sum Randi valt at flyta til Kunoyar?

– Altso, fyri tað fyrsta, so er tað nógv bíligari at búgva í Kunoy. Mamma Rógva er herfrá, og omma hansara eisini. Tá var barn, so var hann nógv her – hann er næstan uppvaksin her.

Fyri teir báðar synirnar, Jón 3 ár og Ivan 1 ár, er tað næstan sum ein ynskidreymur at búgva í Kunoy.

Uttanfyri stendur eitt hús, sum pápin, Rógvi hevur bygt. Rógvi er byggimeistari og hevur hann egna fyritøku, sum hann byrjaði fyri stuttari tíð síðani.

Randi sigur, at nú stórtrívist hon í Kunoy. Tó ásannar hon, at tað var ikki so stuttligt í byrjanini áðrenn dreingirnir vórðu føddir. At verða innikav-aður í Kunoy og ongan veg sleppa, var ikki so idylliskt, tá tað kom til stykkið.

– Men nú dámar mær væl. Eg stórtrívist. Serliga nú tá dreingirnir eru vorðnir størri, er tað deiligt at vera her. Teir eru eisini so tættir, so teir fáa veruliga gleði av hvørjum øðrum, sigur Randi.

– Tað er eisini ofta so, at dreingirnir als ikki tíma til Klaksvíkar. Teir vilja nógv heldur vera í Kunoy.

Tó heldur Randi ikki, at hon hevði kunnað búð í nakrari aðrari lítlari bygd her í Norðoyggjum. Hon sigur, at Kunoy er passaligt. At búð í Mikladali á Kalsoynni ella á Viðareiði kemur als ikki uppá tal.

– Vegasambandið til Klaksvíkar er so mikið gott, og tað tekur so stutta tíð, at eg eri í Klaksvík hvønn dag. Á Viðareiði hevði eg so als ikki tímað at búð – koyrt ígjøgnum allar hasar ræstu tunlarnar, sigur Randi á rættiligum norðoyarmáli og stórflennir.

### Hønumamma

Býargentan, sum nú er vorðin bygdagenta, fær dagarnar at ganga við at gera mat, baka, vaska og tílíkt.

– Dreingirnir taka eisini nógva tíð, og so hava vit vinkonurnar eisini ein bindiklubb. Tær hildu meg vera svaka, tá eg segði, at eg fór at flyta til Kunoyar, fortelur Randi og flennir.

Men ætlanin var upprunaliga als ikki at gerast heimagangandi húsmóðir. Nei, tvørturímóti.

Randi hevði søkt inn á sjúkrasystraskúla í Havn, og hon var eisini sloppin inn.

– Tað hevur altíð verið mín dreymur at gerast sjúkrasystir, men tá eg varð við barn valdi eg at sleppa hesum.

Sjálv er Randi sannførd um, at hetta verður tað, sum hon skal gera tey næstu nógvu árini av lívinum. Ynskið er at fáa meira børn. Kanska eini fimm, um lív og heilsa vilja tað.

– Eg eri rættiliga nógv einsamøll heima við dreingjunum, tí maðurin arbeiðir so nógv, men mamma og vinkonurnar eru ógvuliga raskar at vitja meg. Mamma er her hvønn dag, og nú eru hon og pápi mín farin at byggja her í Kunoy. Eisini tey hava leitað sær henda vegin, tí her er so gott at vera.

Umhvørvið er eisini so barnarvinarligt, sum tað einaferð kann vera. Ongir bilar, so tað er lag á manni hjá dreingjunum at spæla úti. Serliga nú spælihúsið er komið upp at standa í túninum, eru dreingirnir næstan ikki at síggja inni.

Eingin barnagarður er í Kunoy, og heldur ongin dagrøkt, men Randi sigur, at hon er ein hønumamma, so sjálvt um dagrøkt ella barnagarður høvdu verið til staðar, so hevði hon heldur viljað havt dreingirnar sjálv.

– Eg vil heldur vera saman við teimum, og tá maðurin hevur so mikið gott arbeiði, at hetta letur seg gera, so verður tað soleiðis. Hann er eisini glaður fyri, at eg kann verða heima hjá teimum.

Um Randi fer aftur á arbeiðsmarknaðin veit hon ikki enn. Men tað verður í øllum førum ikki fyrr enn dreingirnir eru stórir.

– Men í Kunoy skal eg búgva alt mítt lív, tað er púra vist, sigur Randi at enda.





*Kunoyingar skulu ikki vænta sær nakran útibarnagarð. Málið er steðgað upp, og liggur parkerað hjá kommununi á oynni*

# Ongin útibarnagarður til Kunoyar

BARNAGARÐUR
*Ingrid Bjarnastein*

Eyðgunn Samuelsen, formaður í sosialu nevnd í Klaksvíkar Býráð, sigur, at útibarnagarðurin, sum talan hevur verið um at gera í Kunoy, helst verður av ongum.

– Nú er so langt fráliðið, at eg vænti ikki, at útibarnagarðurin verður til nakað, sigur Eyðgunn Samuelsen.

– Tað tykist ikki, sum hetta er eitt ynski frá Kunoyar Kommunu, og málið er ikki komið víðari.

Sum skilst frá Eyðgunn Samuelsen, liggur málið parkerað hjá Kunoyar Kommunu. Klaksvíkar Kommuna hevur gjørt fyrireikingarnar og seinastu tíðina hevur verið bíðað eftir svarið.

– Men nú er so langt útliðið, at eg vænti ikki nakað svar. Orsøkirnar kenni eg heldur ikki.

Tað var longu tíðliga í vár, at tosað var um hetta við Kunoyar Kommunu, og um alt hevði gingið eftir ætlan, so hevði barnagarðurin helst latið upp um stutta tíð.

Men hvat Klaksvíkar Kommunu viðvíkur, so er málið um útibarnagarðin í Kunoy mestsum lagt á hillina.

Tíverri hevur Heini O. Heinesen, borgarstjóri í Kunoy, ikki verið at hitta til eina viðmerking.

# Sam ger munin



*Bíðirøðin til at sleppa yvirum Leirvíksfjørð er í hesum døgum lítil og ongin*

LEIRVÍKSFJØRÐUR
*Ingrid Bjarnastein*

**Klaksvík:** Týsdagin byrjaði Sam at hjálpa Dúgvuni við siglingini um Leirvíksfjørð. Og hetta hjálpir væl. Tað sæst bara á røðini, sum ofta plagdi at standa á ferjuleguni. Hálvur tími er millum hvønn túrinhjá skipunum báðum, og fáa tey, ið nýta hesa farleið eina munandi betri tænastu.

– Ja, Sam avlastar nógv, sigur skiparin umborð á Dúgvuni.

– Tað hava ikki verið nakrar bíðirøðir, og fólk sleppa nógv oftari um fjørðin.

Eisini tekur Sam nakað av tí tunga flutninginum, men í løtuni hevur ikki verið so nógv av hesum tunga flutningi.

– Skipini koma helst innaftur í morgin ella ovurmorgin, so tá fer tann tunga ferðslan av álvara at byrjað.

Skiparin á Dúgvuni vísir á, at betri pláss er umborð á skipinum nú, og tað tekur ikki so langa tíð at fáa allar bilarnar í land.

– Ein annar fyrimunur er so, at ongar seinkingar verða, tá tvey skip sigla. Tá eitt skip siglir einsamalt, so tekur tað nógv longri tíð at av- og umborð skipa bilar.

So manningin umborð á Dúgvuni er væl nøgd við hjálpina frá Sam.

# Origins til keyps í Føroyum

**Eftir at hava verið á marknaðinum í Danmark í 10 ár og aðrastaðni í 12 ár, hava føroyingar enduliga møguleikan at keypa tann vælumtókta natúrúrdráttin - Origins**

INNANOYGGJA
*Gudny Langgaard*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sosialurin hevur verið inni á gátt hjá Parfurmarí Drós, sum í hesum døgum hevur vitjan av Synvu, ið starvast sum umboðskvinna hjá Origins. Hon er komin til Føroya mánakvøldið og steðgar í eina viku. Synva fer at vegleiða føroyingum um tann vælumtókta úrdráttin og er møguleiki hjá øllum at fara á gátt hjá Drós og verða smurdur av Synvu og samstundis gevur hon sær stundir til at greiða frá tí, sum fer fram. Umframt hetta, verður eisini skipa fyri tveimum kundakvøldum, sum tað verður kallað. Tá sleppa kundarnir sjálvir at reinsa húðina við Origins, at smyrja sær o.s.v.- ímeðan gongur Synva runt og ráðgevur teimum. Til hetta tiltak eru einans pláss fyri 10 fólkum hvørt kvøld og annað kvøldið er longu fultsett.

Pratikanturin á Sosialinum, Brynhild Reinert av Eiði, fekk ein royndartúr í smyrjustólinum í gjár og segði hon, at ein als ikki følir at smyrsl er á andlitinum.

Origins er dóttirfelag hjá tí heimskendu fyritøkuni Estée Lauder. Tey avgjørdu at framleiða eina vøru ið er natúrlig. Tey framleiða smyrsl, krem, kropsshampoo, rakikrem o.a. Allar vørurnar eru framleiddar uttan luktilsi og alkohol, heldur eingin verður testa á djór. Evnini ið verða nýtt eru til dømis piparmynt og hvítt te, ið er komi ístaðin fyri tað nógv nýtta grøna teið. Forskara hjá Estée Lauder havi funnið útav, at tað hvíta teið gevur tríggjar ferðir so stóra ávirkan, sum tað grøna og tað hevur eisini ein ógvuligan frískan og dámligan dám. Synva sigur, at hetta kremi eisini verður nýtt av fólki, ið hava brúk fyri at slappa av - t.v.s. at tað javnvigar okkara kropsskipan.

Origins leggur dent á, at halda vørurnar so natúrligar sum møguligt og er hetta tískil gott hjá teimum ið hava kenslusama húð. Synva sigur, at tað eru eindømir upp á fólk, ið ikki tola Origins. Tó eru tað ikki einans fólk við ringari húð ið nýta henda natúrúrdrátt - tvey dømir, eru sangarinnan Sidsel Kirkjubø og modellin Helene Christensen, ið neyvan



*Her síggja vit Synvu smyrja Brynhild Reinert*

hava brúk fyri serligum kremi, men sum nýta Origins.

Fía Norðberg og Karin Dahl, eigararnir av Drós, hava í longri tíð roynt at fingið hendur á Origins. Origins setur ógvuliga høg krøv til seljaran, men nú er tað enduliga eydnast teimum at fáa vøruna henda vegin og okkum nýtist ikki longur at fara av landinum fyri at keypa Origins. Tær frøðast um at hetta eydnaðist teimum og eru tær ógvuliga spentar upp á at vit hvussu hesin natúrúrdráttur, ið er nógv nýttur runt um í heiminum, verður móttikin her heima.